## Breyt albogan

Danski landsliðsmálmaðurin Jesper Christiansen breyt albogan í dystinum millum FCK og Brøndby í gjár. Ein av Brøndby-spælarunum rendi ógvusliga inn í Jesper Christiansen, sum varð borðin av vølli á børu. Ein fyrrverandi málmaður heldur, at vandi er fyri yrkisleiðini hjá Christiansen nú.
- Tað ringasta, sum kann henda er, at hann ikki heldur fram at spæla. Men er tað lítil møguleiki fyri, at albogin hjá honum blívur aftur, sum hann var, sigur Per Wind við BT.



## Everton vil hava niðurlending

Everton misti í farnu viku verjuspælaran Joleon Lescott til Manchester City, men tað holið skal nu fyllast við tveimum nýggjum spælarum. Everton hevur keypt fraklendingin Silvain Distin í Portsmouth, og nú skal niðurlendingurin Johnny Heitinga verða á veg til felagið úr Atletico Madrid. Sambært bretskum miðlum hevur Everton fingið sítt boð á 42 milliónir krónur góðkent í spanska felagnum.

# Suðuroy aftur millum tey fremstu

**Við heimasigrum syrgdu VB/Sumba, B71 og TB fyri, at kappingin um at flyta upp í bestu deildina fer at standa millum hesi trý feløgini.**




Jákup Mørk

Suðuroy verður næsta kappingarár aftur í bestu deildini. Tað er greitt, eftir at 21. umfar í næstbestu deildini var avgreitt í vikuskiftinum.

Spurningurin, sum framvegis ikki er svaraður, er, um tað verða eitt ella tvey lið úr Suðuroy í fremstu røð. Tað vil siga, um bæði VB/Sumba og TB fara at flyta upp, og tað vil eisini siga, at tað ikki er avgjørt, um VB/Sumba og TB fara at leggja saman til eitt lið, hóast bæði liðini møguliga fara at flyta upp.

Einasta kappingarneytin hjá suðuroyarfeløgunum er B71, sum við 3-1 sigri á teimum næstbestu hjá B68 er næstfremst saman við TB.

Nú leygardagin verður toppuppgerð á Vágseiði, tá ið B71 fer at vitja VB/Sumba. Um tað tá fer at eydnast VB/Sumba at vinna, so verður tað mest sum avgjørt, at VB/Sumba í 2010 verður partur av bestu deildini.

Einasta felagið, sum hevur havt møguleika at hótta tey trý fremstu í spurninginum um uppflyting hevur verið FC Hoyvík. Leygardagin løgdu hoyvíkingar rygg til 4-0 tap í Leirvík, og tað ber við sær, at sannlíkið fyri, at FC Hoyvík í hesum umfarinum fer at flyta upp í bestu deildina er so at siga burtur.

At MB tapti stórt á Sevmýri ber við sær, at miðvingar so at siga eru vísir í, at teir næsta ár aftur fara at spæla í 2. deild. At Skála vann á heimavølli ímóti HB ber við sær, at møguleikin hjá Skála at halda tørn um plássið í næstbestu deildini ikki er heilt burtur.




**Skála er framvegis undir niðurflytingarstrikuni, men sigurin á HB gav vónir um, at tað kann eydnast at bjarga sessinum ímilum tey næstbestu**

savnsmynd

## Fakta um 1. deild

**21. umfar**
**VB/Sumba-NSÍ 4-0 (2-0)**
1-0: Nenad Zivanovic 6.
2-0: Jón Krosslá Poulsen 43.
3-0: Jón Krosslá Poulsen 75.
4-0: Karl Lisberg 80.

**Víkingur-FC Hoyvík 4-0 (2-0)**
1-0: Hjartvardur Hansen 26.
2-0: Hjartvardur Hansen 27.
3-0: Martin Olsen 79.
4-0: Magnus Dalbø 90.

**B71-B68 3-1 (1-1)**
0-1: Jonleif Højgaard 1.
1-1: Símin Hansen br 35.
2-1: Símin Hansen br 75.
3-1: sjálvmál 89.

**Skála-HB 2-1 (1-1)**
0-1: Jákup Slættalíð 18.
1-1: Bogi Gregersen 19.
2-1: Petur Pauli Mikkelsen 54.

**TB-MB 5-0 (3-0)**
1-0: Josef Bassene 2.
2-0: Petur Mortensen 7.
3-0: Aron Sørensen 18.
4-0: Dan Mortensen 63.
5-0: Gilli Sørensen 89.



# Gudmund nummar fimm í Danmark

Gudmund Joensen tók sunnudagin lut í stórari kappingar í 1/4-ironman í Silkeborg.

Til samans vóru á leið 300 luttakarar, og millum hesar gjørdist Gudmundur fimti bestur við tíðini, 2 tímar, 10 minuttir og 43 sekund. Hetta eftir at svomið 750 metrar, súkklað 40 kilometrar og runnið 10 kilometrar.

Gudmund hevur tikið seg nógv fram seinastu árini, hevur seinastu tíðina gjørt somikið nógv um seg í Danmark, at honum nú stendur í boði at venja við TRI4, sum er eitt av fremstu triathlon-feløgunum í Danmark. Eitt tilboð, sum Gudmund eisini hevur tikið av.

**Gudmund Joensen gjørdist nummar fimm í stórari triathlon-kapping í Silkeborg sunnudagin**